## Gistu á Weigh Inn hotellinum

Eftir móttøkuna fyri Norrønu á Weigh Inn hotellinum í Thurso mánakvøldið, hitti Sosialurin eitt føroyskt par, sum skuldi gista á hotellinum hesa náttina. Tey vóru komin til Skotlands við Norrønu hetta kvøldið og skuldu heimaftur mikudagin í næstu viku. Hetta vóru hjúnini, Jakobina og Napoleon Vang í Havn. Ferðamálið hjá teimum var á leiðini norðanfyri Aberdeen, har tey eiga eina verdóttir og abba-og ommubørn. Sum skilst, kemur familjan ikki heim at vitja, tá Jakobina og Napoleon koma heimaftur, men tey "gomlu" gleddu seg til at síggja abba-og ommubørnini aftur.

**(-vilmund)**



*Napoleon og Jakobina Vang "kekka" inn á Weigh Inn hotellinum í Thurso*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Á brúnni á Norr

**- Vit seta trygdina ógvuliga høgt. Hava regluligar trygdarvenjingar, og javnan er eftirlit umborð. Fylgja vit ikki krøvunum, sleppur skipið ikki at sigla. Vit eru "up to date", og okkum dámar best, um vit eru eitt sindur frammanfyri tíðina á trygdarøkinum, sigur Alfred Joensen, skipari á Norrønu**



*Báðir hava teir siglt við gasstangaskipum hjá Lauritsen Kosan Tankers, 36 ára gamli Alfred Joensen (th.) og 59 ára gamli Regin Sø fýra árini í sama reiðaríi, áðrenn felagið gjørdi av at flagga skipini um*

## Sigling



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

Á ferðini við Norrønu úr Føroyum til Scrabster, víðari til Noregs og haðani heimaftur til Føroya, var Sosialurin á vitjan á brúnni.

Vit hittu 36 ára gamla skiparan, Alfred Joensen, sum býr á Norðskála og 59 ára gamla húsvíkingin, Regin Sørensen, sum er 2. stýrimaður.

Teir vóru báðir bæði blíðir og fyrikomandi, og uppi á rúmligu brúnni fingu vit bæði kaffi og køkur.

Hesa løtuna var Norrøna á opnum havi, og tí vóru stundir til áhugavert prát.

Ferðin lá millum 18 og 19 sjómíl um tíman, men skiparin visti at siga, at tá teir sigldu niður ígjøgnum Pentlands Firth, har rættiliga streymhart er, var ferðin 26 sjómíl um tíman.

- Vit høvdu viðstreym, og tað rak einar 6 sjómíl, tá vit sigldu hesa leiðina.

Skiparin sigur, at onkuntíð hevur ferðin verið heilt uppi á 30 sjómílum um tíman, tá tað hevur rikið harðast.

### Gassmenn

Alfred og Regin eru ein mánaða umborð og ein mánaða í landi. Teir hava tað til felags, at teir áður hava siglt úti við sama reiðarí, Lauritsen Kosan Tankers.

Í heili tríati ár stóð Regin á brúnni sum skipari á gassbátum hjá hesum felag, og Regin náddi at vera á brúnni á skipum hjá sama felag í eini fýra ár.

- Meðan eg var við, flaggaði reiðaríið skipini um, og eg náddi at fáa tey seinastu fýra árini hjá hesum felag.

Hóast Alfred og Regin hava siglt hjá sama reiðarí í nøkur ár, hava teir ongantíð verið á sama skipi í senn.

- Nei, vit hava ongantíð verið á sama skipi hjá Lauritsen Kosan Tankers, men vit góvust báðir nakað um somu tíð, tá skipini flaggaðu um, siga teir.

### Trygd í hásæti

Trygdin hevur alt at siga umborð á einum ferðamannaskipi sum Norrøna, og tað er ikki óhugsandi, at slíkir menn, sum hava siglt við gasstangaskipum, eru serliga bevístir um trygdina.

- Trygdarskeiðini hava givið sjófólki nógv. Krøvini eru strong – ikki minst til ferðafólkasigling. Tá syndarligar skipsvanlukkur henda, herðast krøvini við tí fyri eyga at byrgja uppfyri tí, sum hendi – og í aðrar mátar at avmarka vanlukkuna.

Regin vísir á, at venjingar eru umborð á Norrønu hvørja viku, og hesaferð skuldu venjingar verða, meðan skipið lá á Seyðisfirði. Steðgurin í Íslandi er fýra tímar, og tá eru stundir til neyðugu venjingarnar.

- Trygdarvenjingar eru neyð- ugar, tí manningin skiftir alla tíðina. Vanliga eru fólk umborð fýra vikur í senn, og soleiðis fer onkur í land – og onnur kemur umborð alla tíðina.

Skiparin vísir á, at øll manning-